**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ÚTSTYKKING**
**Á LYGNNESI Í KOLLAFIRÐI**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum 1 og 2 dagf. 28.04.2011, matr. nr. 203c, 209, 308 og 309, Kollafjørður og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er uml. 5.500 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 10 grundøkir til stakhús,

Stk. 4. Grundøkini eru uml. 425 til 625 $m^2$ til støddar .

Stk. 5. Vegatgongd til útstykkingina verður frá á Lygnnesi..

Stk. 6. Á kortskjølunum stendur fermetratal fyri hvørt grundøki. Hesi kunnu verða reguleraði í ein vissan mun í sambandi við projektering og matrikulering.

Stk. 7. Sambært kap. IV, §5, stk. 2. í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu grundøkini í A1-økjum vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús. Tá ið byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regularaði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til sethúsabygging.

Stk 2. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 19. februar 2009, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki førir við sær nakra ferðslu frá starvsfólki ella viðskiftafólki til og frá økinum.

Stk. 3. Eitt eigarafelag skal skipast fyri útstykkingina, har allir eigarar skulu vera limir.

## §4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA

Stk. 1. Byggistig og nettunýtslustig má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kan hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Bilhús/bilskúr/úthús verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer uppum 35 $m^2$.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan. Hetta skal eisini tinglesast í skeytið fyri allar ognirnar.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




# Tórshavnar Kommuna

**Byggi- og býarskipanardeildin**

**Heiti:** Serstak byggisamtykt fyri matr nr.203c, 209, 308 og 309 í Kollafjørður

**Viðmerking:** Yvirlitskort

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Skjal nummar:** 1. | | **Journal nr:** 2011-0604 | |
| **Dagur:** 28.04.11 | **Mát:** 1:1500 | **Tekna:** MKJ | |
| **Rættað:** | | | |




# Tórshavnar Kommuna

**Byggi- og býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti:** | Serstak byggisamtykt fyri matr nr.203c, 209, 308 og 309 í Kollafjørður |
| **Viðmerking:** | Skipan av øki |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Skjal nummar:** | 2. | | **Journal nr:** | 2011-0604 | |
| **Dagur:** | 28.04.11 | **Mát:** | 1:1500 | **Tekna:** | MKJ |
| **Rættað:** | | | | | |

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
100 Tórshavn

3. oktober 2011
Mál: 11/00509-8
Tygara skriv: 211-0604/23
Málsviðgerð: KHP

**Serstøk byggisamtykt á Lygnnesi í Kollafirði**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, hevur Tórshavnar kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt á Lygnnesi í Kollafirði til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um skipan av útstykking og bygging av 10 stakhúsum á Lygnnesi í Kollafirði.

Sagt verður frá, at Innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktini á Lygnnesi í Kollafirði.

Víst verður eisini til ætlanarskriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 14. september 2011.

Hjálagt er byggisamtyktartekstur og kortskjal við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Kristvør Poulsen